Ólógligt úr odd í egg

HIN MERKILIGASTA VERJA FYRI ÓLÓG, IÐ HILDIN ER Á FØROYA LØGTINGI

Sum nú vorðið flestu monnum kunnugt gjørdu Sámal Petersen og síðani honum á baki landsstýrisflokkarnir á tingi hina grovastu missmunar — og órættvísisgerð, tá ið hann sum løgtingsformaður fyrst við at avvísa og síðani landsstýristingmenninir við atkvøðu at fella, at javnaðartingmenn skuldu fáa loyvi at leggja fram missálitisrit til landsstýrið við kravinum um løgtingsval, hóast formaðurin á tingfundi dagin frammanundan — uttan at framløga var á dagsskrá ella serligt loyvi var samtykt av tinginum — hevði tikið ímóti einum álitisvotum til landsstýrið frá formonnunum í samgonguflokkunum og lagt tað fram á tingi.

Hesum herverki móti grundarlagnum í sjálvum demokratinum at allir flokkar skulu hava sama politiska rætt, máttu javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin mótmæla við ikki at møta á tingi, fyrr enn landsstýrissamgongan skrivliga hevði váttað, at fyri framtíðina skuldu andstøðan hava sama framlegu- og viðgerðarrætt sum landsstýrisflokkarnir ella til tess tingið var lógliga sett.

Tað seinasta kundi ikki henda á lógligari grund uttan við hjálp av andstøðuni, ella tá ið stjórnarflokkarnir aftur fullmannaðir kundu møta og taka sæti á tingi.

Men stjórnarflokkarnir vóru ov hugstórir og diktatoriskir til at vilja viðganga sin órætt og lova andstøðuni fullan demokratiska rætt fyri framtíðina.

Og í hesum hugmóði og diktatoriska trossi taka teir so til at halda fram við og herða lógloysisgerðir sínar.

Teir seta tingið við einum minniluta uppá 14 tingmenn, hóast tað ongatíð áður er hent í Føroya oldargamla løgtingssogu, at tingið er sett uttan fyrst er váttað, at ein meirluti er møttur, og at tingið er viðtøkufort.

Móti hesum ræðuliga og óhugnaliga lógloysi á Føroya løgtingi mótmæltu andstøðuflokkarnir, og javnaðarflokkurin segði seg ikki at kunna góðkenna gerðabókina og kravdu atkvøðuna um góðkenningina at fara fram við navnakalli.

Men tað vildi formaðurin ikki ganga við til á ti fundinum.

Í neyðini stígur nú løgfrøðingurin Poul Petersen úr sæti og landsstýrissamgongunnar vegna roynir hann at rættvísgera, at ein minniluti hevði sett tingið.

Hann kundi eingi »argumentir« flyta fram uttan tey »søktu«, at tað ongastaðni í tingskipanini stend ur, at minniluti ikki kann seta tingið, og at tað er boðið landsstýrinum at leggja fíggjarlógina fram, áðrenn 1. september.

Formenninir fyri andstøðuni svaraðu Poul Petersen,

at tingið, so gamalt tað var, hevði skilt og praktiserað lógina soleiðis, at tingið má vera viðtøkufort fyri at kunna setast.

Hvørja ferð tað eru møttir ov fáir til at vera ein meirluti, er fundurin vorðin útsettur, til tess meirluti kann fáast á fund.

Ein fundarsetan við einum minniluta er rúkandi ólógligur og í stríð við allan gamlan føroyskan tingfundarsið

Sleppa vit kravinum um meirluta fyri, at tingið kann verða sett, eru vit úti í skilaloysinum, tí tá er jú einki í vegin fyri at tingformaðurin einsamallur kann spæla ting.

Diktaturið spælir jú við einum manni — diktatorinum.

Tað eru øll sólarmerkir um diktatorin aftan fyri sjálvstýrissamgongunnar gekkaskort.

PINOTEX

tað rætta smyrslið — tann rætta verjan til alt timbur

og nú er komið nýtt Pinotex-evni:
PINOTEX ÆDELTRÆSOLIE,
sum einans er ætlað sum eykaverja til edlari træsløg (t.d. ikki furu).

smyrjið **NÚ**

ÆLABOGIN

Tórsgøta 16
Tlf. 2120

estra . Æ4

Amnesty International

Sunnudagin 29. august 1965 varð stovnað nýtt felag í Havn. Tað var AMNESTY INTERNATIONAL sum helt stovnandi aðalfund. Navn felagsins er AMNESTY INTERNATIONAL, Faroes Section. Væl av fólki var møtt og sett varð fimm-mannanevnd at stjórna felagnum.

Endamál felagsins er at veita fólki hjálp, sum verða havd í fongsli, eru innibyrgd, liva í útlegd ella verða diskriminerað á annan hátt orsakað av pólitiskari ella átrúnaðarligari sannføring ella orsakað av uppruna og húðaliti. Henda hjálparveiting er tó treyta av, at viðkomandi ikki hevur nýtt harðskap ella eggjað til harðskap í stríðnum fyri hugsjónum sínum.

AMNESTY INTERNATIONAL er ópolitiskt felag og óheft av politiskum og átrúnarligum rørslum. Felagið sum slíkt kann ikki taka støðu í politiskum ella átrúnaðarligum spurningum. Felagið er tilknýtt AMNESTY INTERNATIONAL, London. AMNESTY INTERNATIONAL styðjar seg til humaniter princippir, soleiðis sum hesi m.a. eru orðað í greinunum 18 og 19 í »Yvirlýsingini um mannarættindini«, ið samtykt varð á aðalfundi Sameindu Tjóða hin 10. desember 1948. Felagið hevur konsultivan status innan ST og Europaráðnum.

Fólk, ið hava áhuga fyri at styðja hetta endamál kunna venda sær til AMNESTY INTERNATIONAL, Faroe Section, Post box 219, Tórshavn.

Og hetta hendir undir hesum landsstýrinum

»RÆÐULIGASTU« MILITER SKRÍMSL VERÐA »AVDÚKAÐ« AV »14. SEPT.« OG HETTA HENDIR ALT UNDIR TJÓÐVELDIS- SJÁLVSTÝRIS- OG FÓLKAFLOKSKA LANDSSTÝRINUM

Maður í landsstýrisfylkingini er spurdur, hvussu ið vorðið er við hesum.

Hann svarar, at hatta við kortunum er gamalt og eldri enn hetta landsstýrið og øll okkara landsstýri og NATO og hevur einki at gera við tað sum nýhending. Øll lond í heiminum hava tílíka eftiransan vegna njósnarariið, ið finst allastaðni.

Ger so landsstýrið ella tjóðveldis menn í landsstýrinum einki í hesum »14. september« gølu málum?

Nei, hvat skal ein gera, har ið royður er, men eingin grind?

BRAMNÆS fyrrv. stjóri fyri Danmarks Nationalbank, og ráðharri í javnaðarstjórn, er deyður 86 ára gamal. Hann var í síni tíð við til at stovnað felagið Norden í 1917.

825 STUDENTAR vóru immatrikuleraðir á lærda háskúlan í Bergen í heyst móti 762 í fjør.

12 FÓLK vórðu dripin í ferðsluni seinasta week-end í Svøríki. Hetta er hægsta talið higartil.

Valdu at tiga

Framhald frá 1. síðu.

nevnd av »súltaðum« málum, stórum og týdningarmiklum málum.

Jú kvørnin mól groft, so groft, at eingin ivaðist í, at uppgerðin teirra millum var av ramasta álvara.

Og fólk gleddu seg við, at tað kortini fanst ein ferðil av rættum monnum í teimum, sum ikki vildi spæla við í ørvitismeldrinum longur.

At eitt val vildi týða eina týning av sjálvstýrisflokkanna valdi, mátti vera ein beiskur biti hjá løgmanni og øðrum at svølgja. Men hann, sum orkar at siggja deyðan í eyguni og falla við fattum enni fram eftir rommum, hevur bjargað æruni, meðan hann, sum ræðist og ynskir seg undir moldum, stingur høvdið undir dýnuna og vil fjala seg fyri tí óuttanumkomandi deyðanum, verður taldir millum vesælingarnar og doyr æruleysur.

Løgmaður, mín forni partamaður, hevði einaferð hugsjónir. Hann skjeytst so av góðum haga niður á láglendi við yglasjúkuni. Hvussu verður lagna hansara? Verður hon teirra diktatora, einræðismanna, sum eins og hann byrjaði sum góðir javnaðarmenn og hugsjónarmenn, men sum fullu fyri freistingini at gylla seg sjálvan við einræðisvaldi og gerningum, og sum royndu at gera ta eini missgerðina góða við at gera nýggja missgerð, til tess teir vóru úti í óførinum og endaðu dagar sínar hongdir í gálgan av fólkinum, teir høvdu kúgað og vannstýrt.

Hetta er ein brennandi spurn ingur úti millum manna.

Løgmaður er fallin, hann og hansara menn hava gjørt missgerðir og roynt at káva út yvir við nýggjum missgerðum.

Men so leingi, sum lív er, er vónin ikki heilt slókt.

Fólk tekur tað sum eitt tekin fyri tí góða, tá ið nú løgmaður kanska hevur fingið samgonguflokkarnar at taka mótmælisuppskotið sum teirra, sum eitt tekin fyri, at løgmaður og hansara menn í seinastu løtu hava aftraað seg við at verða merktir sum orðloysingar og tað, sum verri er. Fólk kring alt Føroya land situr í spenningi og bíðar eftir, um løgmaður møtir fólksins dómi við fattum enni og heldur orð sítt um nýval fyri at sleppa burtur úr tí veruliga stjórnarloysinum, sum ræður í dag, ella um hann stingur høvd ið undir dýnuna, tekur øll síni manniligu orð aftur og skulkar sær eitt ár enn undan fólksins dómi, fólksins politiska deyðadómi.

Roynast nú løgmaður og hansara fylgismenn sum menn ella fara teir at brennimerkja seg sum orðloysingar og politiskir ræðuskitar við at fella upp skotið um nýval, tað valið sum teir sjálvir hava kravt fyri at sleppa landinum aftur í hampilig stjórnarkor?

Tað er tann brennandi spurningur fólksins, sum er uppi um alt Føroya land í dag.

— — —

Tað kvatt ikki úr nøkrum av stjórnarflokkunum.

Teir sótu og dríptu høvur sum heimurin var fallin yvir teir.

Heldur ikki orðføraranum fyri sambandið, Jóhann Poulsen,, ið helt líknandi dómadagsprædiku fyri teimum, orkaðu teir at svara við einum orðum.

Teir sótu og svølgdu sum heimsins størstu syndarar.

OG TÁ IÐ ATKVØÐIÐ VARÐ, KRUPU TEIR UNDIR DÝNUNA. IKKI EIN AV STÓRORÐAÐU TORDU AT TAKA VALIÐ, TEIR HØVDU BREGGJAÐ AV SKULDI KOMA

ÚTVARPIÐ

Leygardagin 4. september:
07.15: Morgunlestur.
07.30: Veðrið og tíðindi.
07.37: Tónleikur.
12.00: Konsert.
12.20: Veðrir og tíðindi.
12.32: Døgurðatónar.

Endursendingar
13.00: Benny Samuelsen lesur 1. part av søguni »Gentlemaður í frumskóginum« av W. Sommerset Maugham. Regin Joensen umsetti.
13.25: Tónleikur.
13.40: Býir í miðoldini. Fyrilestur av Hans Jákupi Debes.
14.00: Løtt løg.
14.20: Samroða við summargest (Haldane Nap. Isaksen, skipara á Fartry III).
14.40: Vera Lynn syngur.
14.50: Willy Kastborg um nýggjari norskar bókmentir.
18.30: Veðrið og tíðindi.
18.42: Harmonikutónar.
19.00: Høvini og lívið í teimum. Jóannes Skála greiðir frá.
19.45: Kendir klaverspælarar: Walter Gieseking.
19.40: Týska álopið á Sovjetsamveldið í 1941. Hans Thomsen sigur frá.
20.00: Kom og dansa —

Sunnudagin 5. september:
14.00: Tónleikasending.
15.00: Kvøðuljómar.
16.50: Veðrið og tíðindi.
17.00: Gudstænasta.

Mánadagin 6. september:
07.15: Morgunlestur.
07.30: Veðrið og tíðindi.
07.37: Tónleikur.
12.00: Konsert.
12.20: Veðrið og tíðindi.
12.32: Døgurðatónar.
18.30: Veðrið og tíðindi.
18.42: Úr ymsum heraðshornum.
19.00: Løtt løg.
19.40: Klassisk grammofonkonsert: Trio í B-dur fyri klaver, cello og violin, opus 99, av Franz Schubert. Alfred Cortot (klaver), Jacques Thibaud (violin) og Pablo Casals (cello).

Týsdagin 7. september:
07.15: Morgunlestur.
07.30: Veðrið og tíðindi.
07.37: Tónleikur.
12.00: Konsert.
12,20: Veðrið og tíðindi.
12.32: Døgurðatónar.
18.30: Veðrið og tíðindi.
18.42: Aftur við nátturðanum.
19.00: Barnasending.
19.30: Sangur og tónleikur.